VIÐMERKINGAR

# Vit mótmæla

**Palli Dalsgaard**

Tað mundi mangur á Sandoynni hvøkka við, tá tey lósu greinina hjá skilmanninum, Ein føroyingur – ein atkvøða! Einki er at ivast í, at í sjálvum býtinum hevur hann allan rættin, men, hví skal býtið gerast? Hví er ójavnin? Hevur ójavnin ikki altíð verið? Vit hava livað við honum í so mong ár, og ójavnin hevur itl tíðir verið nógv størri í ymsum plássum, enn hann er í dag.

Skal handan mannagongdin fylgjast, so verða tað ikki mong ár afturat, sum gongdin er í dag, til eingin løgtingsumboðan verður á Sandoynni og bert ein í Vágum. Hvat er tá vunnið? Sandoyggin er av náttúrunnar hond nógv skerd, í mun til nógvar av hinum oyggjunum.

Fólkatalið er ov lítið til at kunna nøkta tørvin til nógv av teim ynskjum, ungdómurin hevur í dag, sum ungdómurin hevur í øðrum plássum. Men sigast skal, at tað gongur rætta vegin, hóast stríggi er at koma á mál. At flyta annað løgtingsumboðið av Sandoynni til Havnar, man vera ein hugsan, sum fáur av teim sum her búleikast tekur undir víð. Vit hava einki móti Havnini, men har er ikki so lítið sum er, latum okkum hava tað í friði, sum vit hava.

Tað vil til allar tíðir verða fleiri atkvøður til hvørt valevni, har fólkatalið er stórt og færri har fólkatalið er tað mótsatta. Lítið er at ivast í, at í Sandoyar sýslu eru tey flestu samd um, at hendan ætlan ikki má blíva veruleiki og vit eru eisini samd um at mótmæla.

# Viðmerking til oddagrein »Politiserandi embætismenn«

**Rói Eliasen**
*Nuuk*

Í oddagrein í Sosialinum tann 25. januar 2002, verður millum annað skriva at »í hesum valskeiðinum hava vit verið vitni til politiserandi embætismenn«.

Til hettar kann sigast, at ein embætismaður skal verða loyalur yvir fyri sitandi samgongu. Tað vil siga, at viðkomandi - samstundis at hann er sakligur – skal virka fyri, at tann politikkur, sum er settur út í kortið, verður gjøgnumførdur. Um hann ikki ger tað, verður hann í vanligum førum settur í annað starv.

Aðrastaðni í oddagreinini stendur m.a., at "Fólk hava gjørt vart við, at sera lítið var gjørt við loysnir millum heimastýri og fullveldi innan fyri danska grundlóg, og at menn vóru ov bráir at avskriva henda møguleika«.

Vanligt er, at sitandi samgonga/landsstýri ger eitt kommissorium/arbeiðssetning til ein bólk av fólki, sum landsstýrið setir.

Hetta er vanligur fyrisitingarsiður og kanska eina mest í politiskum settum nevndum. Hvítabók er sjálvandi skrivað eftir tí politiska málinum, sum ein politiskur meiriluti var fyri. Ein dugnaligur embætismaður í einum lítlum landi sum Føroyum skal helst arbeiða eftir klárum politiskum máli og halda seg innan hendan karm. Akademikarar eru sjálvsagt sjálvdan einigir í einum arbeiðssetningi, men eru teir ikki tað, so mugu teir finna sær annað starv.

Hjá tí vanliga embætis manninum er dagliga ein konflikt í millum tann førda politikkin og tí akademiska hugburðinum, men her er hann noyddur til at halda seg til politikkin og ikki til hansara egna hugsan. Tó hevur hann møguleika til at koma við egnum sjónarmiðum, um biðið verður um tað.

Í størri londum verða teir miðfyrisitingarligu embætismennirnir settir politisk. Um hettar er møguligt ella neyðugt í Føroyum, er ein stórur spurningur.

# Miðsavnað servitan gevur førleikamenning

**Annita á Fríðriksmørk**
*tingkvinna Tjóðveldisfloksins*



Ein tjóð við 47.000 fólkum hevur avmarkað tal av dugnaligum búskaparfrøðingum, dugnaligum løgfrøðingum og dugnaligum EDV fólkum. Hetta avmarkað tal av serfrøðingum má tí ikki spjaðast runt innan tað almenna. Hesi eiga hinvegin at sita saman í hvør sínum fakbólkum, til tess at skapa og menna eitt umhvørvi. Sótu løgfrøðingar í einum umhvørvi, búskaparfrøðingarnir í einum, og EDVfrøðingarnir í einum, so vildu tey sjálvsagt dagliga lært ótrúliga nógv av hvørjum øðrum.

**Tiltalar ikki Fólkaflokkin at broyta almennu umsitingina**

Havi fleiri ferð reist spurningin á tingi um at miðsavna servitanina innan búskaparfrøðina, løgfrøðina og EDV. Men hugskotið verður tíverri kveistrað av borðinum av Fólkaflokkinum, sum umsitur landsumsitingina. 80-árini verða brúkt sum ræðandi dømi um, hví onki má henda. Tá var landsumsitingin veik, henni vantaði arbeismegi, og somuleiðis vantaði førleika á fleiri økjum.

**Vit spjaða servitanina**

Men trupulleikin er, at verandi bygnaður vantar somuleiðis arbeiðsmegi á fleiri økum. Vit lósu so seint sum fríggjadagin í Dimmu, at ongin løgfrøðingur søkti starvið á oljuskattafyrisitingini, sum ætlanin er at seta á stovn í Klaksvík. Og tað er bara ein spurningur um tíð, so fara aðalstýrini eisini at vanta útbúna arbeiðsmegi. Orsøkin er einføld: vit spjaða servitanina.

**Avleiðingarnar av spjøddu servitanini**

Avleiðingarnar av hesi spjaddu servitan er:

- at frøðingarnir ikki fáa møguleika at menna seg í einum umhvørvi.
- tey líða í fleiri førum undir einsemi, tí ov fá eru at viðgera trupulleikarnar/uppgávurnar saman við.
- tey arbeiða í alt ov lítlan mun við tí, teir eru útbúnir til, og mugu ofta sita við vanligum fyrisitingarligum uppgávum.
- at tey rættiliga tíðliga fáa leiðarastørv í boði
- at tey støðast ikki leingi innan tað almenna, tí so títt og knapt tey hava fingið eina ávísa innlæring í tí almenna starvinum, so er tað privata har, og bjóðar teimum eitt vællønt og avbjóandi starv.

**70 limir í Búskapar- og løgfrøðingafelagnum**

Tað stóð eisini í Dimmu hendan dagin, at 70 limir eru í Búskapar og løgfrøðingafelagnum.Nú veit eg ikki, hvussu nógvir aðrir búskapar- og løgfrøðingar eru í landinum umframt hesar 70. Slík týðandi hagtøl finnast ikki. Men tað sigur seg sjálvt, at skulu hesi spjaðast runt á 7 aðalstýri, umframt aðrar stovnar undir landinum, til oljufeløgini og til vinnuna annars. So verður tunt onkustaðni.

Tí er tað, at eg ferð eftir ferð í løgtinginum havi víst á trupulleikarnar við verandi bygnaði. Har mugu umstruktureringar til.

Tað verður ikki eftir einum degi, at tað verður gjørt. Til tað er tann al menna umsitingin ein alt, alt ov stórur biti at fara í holt við.

Vit noyðast hinvegin at byrja við at fáa lýst støðuna, og harvið eisini fáa til vega eitt fylgjandi tilmæli um, hvussu vit best koma burturúr hesi ringrás, vit eru vavd inní.

# Norðoyatunnilin, nýggj linjuføring, Kalsoyggin

**Hans Hendrik Mikkelsen**
*verkfr.*




Mangt hevur í seinastuni verið frammi um Norðoyatunnilin, seismiskar kanningar, órógvan av fornaldartoftum, partafelag stovnan v.m.

Eitt hevur tó eftir øllum at døma ligið heilt fast; tað er at hon skal ganga frá Hagaleiti til Borðoyavík. Eftir øllum at døma kann ongin onnur linjuføring koma upp á tal.

Eg fari tó at loyva mær at skjóta upp at broyta linjuføringina, so at hon verður løgd frá Hagaleiti til Klakkin.

Verður hugt at hjálagda korti sæst, at longdin verður tann sama, so hetta skuldi ikki ávirka tann skeiva vegin.

Vónandi hava seismisku kanningarnar á hesum økinum víst líka positiv úrslit sum á sunnari linjuføringini.

Av fyrimunum við hesi linjuføring skal her nevnast fylgjandi: Bygging á ídnaðarøkinum við Borðoyavík kann byrja beinanvegin.

Tunnilin kann íbindast tann ætlaða ringvegin, so samband fæst við eystursíðuna, eins og havnaøkið á vestursíðuni fær beinleiðis samband við tunnilin.

Dýpið við hesi nýggju linjuføringini er um 20-25 m. grynri enn sunnara linjuføringin.

Eisini liggur henda linjuføringin bert uml. 1 km frá Kalsoynni. Tað skuldi verið gaman í at fingið Kalsoynna bundna í tunnilin í framtíðini.

Hetta hevði óivað eisini verið bíligari enn bæði at skula gjalda fyri ferjulegu, ferju til 5-10 bilar umframt rakstur av hesum.

Eg fari inniliga at heit aá okkara politikarar um at hugsa gjølla um hetta uppskot mítt, sum eftir míni sannføring er besta loysnin, og sum kann gera sentralu Føroyar eina heila oyggj størri.



VIÐMERKINGAR

# Greiðar linjur millum alment og privat

**Høgni Hoydal**
*Formaður í Tjóðveldisflokkinum*



**Tjóðveldisflokkurin vil hava greiðar linjur millum alment og privat: Tær almennu tænasturnar skulu vit øll í felag gjalda til, so tær virka optimalt fyri øll.**

**Meðan privat og vinnuligt virksemi skal virka á jøvnum kappingartreytum og kasta av sær til samfelagið – uttan at váðin og eykarokningarnar verða løgd á vanliga føroyingin.**

Orðaskiftið um einskiljingar (privatiseringar) hevur lyndi til at enda í hugsjónarligum barnagarðstosi, sum hoyrir eini farnari tíð til.

Alt verður vavt saman í ein vavgreyt. Uppskot eru um at "privatisera" Postverkið, Strandferðsluna, Landsverkfrøðingin, Landsjørðina og aðrar lívsneyðugar partar av einum nútímans føroyskum samfelagi.

Men hetta hevur onki við privatiseringar at gera. Heldur tykist ætlanin at vera, at almennar tænastur verða sundurpettaðar til nøkur privat virki, sum síðani fáa eina játtan á fíggjarlógini. Enn hevur ongin víst á nakra meining við hesum – hvørki at tað verður betri, bíligari ella tryggari.

**Almennar tænastur neyðugar fyri vinnulív**

Hinvegin er tað týdningarmikið at vit seta greiðar linjur millum alment og privat, um vit skulu hava eitt trygt og sjálvberandi vælferðarsamfelag.

Teir flokkar, ið vilja seta alment virksemi og privat vinnuvirksemi upp ímóti hvørjum øðrum, byggja á eina heimsmynd frá tíðini, tá Berlinmúrurin enn stóð.

Høvuðstáttur í vinnupolitikki Tjóðveldisfloksins er at skapa greiðar linjur millum almennar og privatar uppgávur. Uttan ein vælvirkandi almennan sektor við skúlum, mentanarstovnum, vegum, postverki, teleneti, posti, sjúkrarøkt, pensiónstrygd, umhvørviskrøvum, so ber onki vinnulív til. Og uttan eitt sterkt og sjálvberandi vinnulív, er onki avkast til at fíggja eina vælferð fyri øll. So einfalt er tað.

**Úr heimastýriskreppuni**

Tær sjálvstøðugu Føroyar skulu burtur úr skipanum við politiskari stýring av vinnuni, har studningur og fyrimunir verða latnir einstøkum vinnum og fyritøkum, ið skulu bera øllum samfelagsbúskapinum. Hetta leggur eisini allan váðan á skattgjaldaran, men hann fær ikki vinningin. Gongur væl, so tjenar privata vinnan pengar. Men gongur illa, stendur skattgjaldarin eftir við rokningini.

Hetta kenna vit alt til í Føroyum og tað má ongantíð henda aftur.

**Almennu uppgávurnar**

Tí er okkara boðskapur. Lat okkum brúka almennu orkuna til:

- Dagsstovnar, eldararøkt, sjúkrahús, tilboð til brekað
- Útbúgving fyri øll, mentanarstovnar og gransking
- Eitt nútímans veganet, posttænastu, telekervi
- Umhvørviskrøv, trygdarkrøv og heilsukrøv
- Eitt einfalt og trygt lógarverk við fullgóðari umsiting og rættartrygd
- Og at fáa eina rættvísa skattaskipan og javnar treytir til tey, ið vilja reka vinnu og troyta alment tilfeingi

Uttan hetta, so fær tann dugnaliga føroyska vinnan stórar trupulleikar frameftir, og vit fáa ikki grundarlagið fyri veruligari vælferð.

**At fáa endurgjald og spjaða váða**

Og lat okkum so tosa um, hvussu vit fáa eitt betri býti millum alment og privat eftir heimastýriskreppurnar, har vanligi føroyingurin og túsundtals familjur hava goldið við kenslum, persónligum missi og skattatrýsti.

Føroya Banki, Føroya Fiskavirking og Framtaksgrunnurin eru úrslit av politisku kreppuloysnunum, tá Føroyar vórðu settar undir umsiting. Skattgjaldarin og serliga tey, ið vóru harðast rakt av kreppuni, hava rindað prísin fyri loysnirnar.

Tjóðveldisflokkurin virkar fyri, at fiskiídnaðurin fer aftur undir privat vinnuvirksemi – so tað almenna ikki ber allan váðan, um niðurgangstíðir koma. Men ein treyt má vera, at tann vitan og tann førleiki, ið eru uppbygd í framleiðslu, marknaðarføring og marknaðaratgongd, ikki verða syndrað og fara av landinum.

**Føroya Banki – eitt aktiv**

Føroya Banki er í dag eitt týdningarmikið virði hjá landinum og fólksins ogn. Vit eiga at passa okkum løgir, soleiðis at skattgjaldarin fær pengarnar aftur fyri bankabjargingarnar við rentu av rentu.

Treytirnar fyri at fara undir hetta eiga at verða:

- At ikki verður selt burtur av hesum ognum uttan so, at landskassin fær stóran vinning og fult endurgjald fyri bjargingarnar.
- At vinnubygnaðurin í Føroyum ikki órógvast
- At ræðisrætturin ikki endar á fáum hondum
- At peningurin verður settur í Búskapargrunn Føroya, har hann kann nýtast til at niðurgjalda skuld, tryggja landskassan og veita sosiala trygd fyri allar føroyingar

**Útbjóðingar av almennum tænastum**

Útbjóðingar av almennum tænastum eru vorðnar vanligar í øllum Norðurlondum við skiftandi úrsliti. Tjóðveldisflokkurin leggur dent á, at heilsu-, almanna, skúlamál og mentanarstovnar eru ein almenn uppgáva, sum skal tryggjast javnbjóðis til allar føroyingar.

Uppgávurnar og tænasturnar á samferðslu- og samskiftisøkinum eru somuleiðis almenn ábyrgd, har javnbjóðis tænasta til allar borgarar skal tryggjast. Hesar eru fyrst og fremst: Tekniska útbyggingin (Landsverkfrøðingsstovnur), Telesamskiftisnet (útbygging av telekervinum til alt landið), Posttænasta, Flutningur av fólki og farmi.

Vit skulu menna hesar uppgávur hjá stovnum, sum við lóg hava skyldu at tryggja tjóðini, at teknisk vitan, royndir og tænasta verður bygd upp, og at vit í felag gjalda kostnaðin.

Tó kunnu hesir stovnar lata privatar vinnufyritøkur útinna uppgávur við útbjóðing á javnbjóðis kappingartreytum, treytað av, at stovnarnir hava ábyrgdina mótvegis myndugleikunum fyri, at tænastan verður framd nøktandi fyri øll.

# Føroya fólk hava ikki ráð til sitandi landsstýrið

**Edmund Joensen**



- Hall er á løgtingsfíggjarlógin fyri 2002.
- Besta intøkuárið í Føroya søgu mugu avdrøg av landskassans skuld gjaldast av innistandandi.
- Veruligi útreiðsluvøksturin á løgtingsfíggjalógini hetta valskeiðið ferð, tá ið samanum kemur, at nærkast eina heilari milliard.
- Fíggjarlógin var ikki meira enn samtykt, tá sjálvur løgmaður, tann 7. januar boðaði frá fyrstu eykajáttanini í 2002.
- Samlaðu eykajáttanirnar í 2001 vóru heilar 207 mió. krónur.
- Landstýrið er nú eftir øllum at døma av álvara farið undir endaligu útgjaringina til løgtingsvalið.

Beint áðrenn jól samtykti ein minniluti (15 av 32 løgtingsmonnunum) løgtingsfíggjarlógina fyri næsta ár. Trettan atkvøður vóru ímóti, ein tingmaður atkvøddi ikki og tríggir vóru ikki í salinum.

Hetta er so fyrstu ferð í Føroya søgu, at ein løgtingsfíggjarlóg til seinastu og endaligu viðgerðina hevur fingi so lítla undirtøku (og so stóra mótstøðu) í Løgtinginum.

Hetta er somuleiðis ein stór falliterklering til sitandi landstýrið og meirlutan á løgtingið.

Í framkomnu londunum, sum vit vanliga sammeta okkum við, hevði stjórnin í stundini endurskoða sín politikk ella farið frá.

Síðani nýggja stýrisskipanarlógin kom í gildi, hava polittisku flokkarnir roynt at taka til sín siðvenjuna at atkvøða fyri løgtingsfíggjarlógini til seinastu og endaligu viðgerðina. Vanliga polittiska togan-in um konti og játtanir til ymisku økini í landinum er tá av, og prioriteringin hjá einum meirluta er tá staðfest. Hetta verður gjørt í ásannan av- og viðring fyri tí demokratisku skipanini vit hava. Landið skal undir øllum umstøðum hava eina løgtingsfíggjarlóg.

Landstýrið og samgongan gjøgnumtrumfaðu uttan fyrilit fyri føroyska samfelagnum so grundleggjandi og skaðiligar broytingar til løgtingsfíggjarlógina, at andstøðan atkvøddi ímóti meðan partur av samgonguni helt seg burtur.

**Hvørki tingmenn ella fólkið hevur álit á førda politikkinum**

Tað sum hent er á Føroya løgtingið í sambandi við løgtingsfíggjarlógina fyri 2002 má sigast at vera ein sannan av, at hvørki meirlutin á løgtingið ella av Føroya fólk hava álit á førda politikkinum.

At flestu fólk ikki hava álit á landstýrinum og sitandi meirluta á tingið, kan ikki koma óvart á nakran. Hetta er so týðiliga komið fram, í dagligari talu ímillum manna, og eisini í teimum nógvu veljarakanningunum sum verið hava.

Fólkatingsvalið fyri kortum talar eisini sítt týðiliga mál. Føroyingar taka snøgt sagt ikki undir við førda loysingarpolitikkinum, har heildarveitingin og vælferðin verða skerd. Tey síggja sjálvandi, at hesin politikkur er landskaðiligur og má steðgast ongantíð ov skjótt.

Spurningurin sum eftir stendur er, um Føroyar hava eitt landstýri og ein samgonga, sum eru so újssalig og so koyrd føst, at tey sjálvi ikki finna úthurina ? Mangt bendir á at so er. Eitt er vist, Føroya fólk hava ikki ráð til hetta landstýrið.

Eitt ár í býráðnum 5:

# Ferðsla og parkering

**Jógvan Arge**
*býráðslimur í Havn fyri tjóðveldisflokkin*



Eitt mál, sum hevur tikið sína tíð í teknisku nevnd, er tann nýggi Marknagilsvegurin og tað, sum av hesi vegagerð hevur staðist. Har fóru teir í farna valskeiði brótandi út ímillum hús við einum breiðum og himmalhøgum vegi, sum hevur broytt heimsmyndina hjá teimum, sum eru í nánd.

Vegurin er komin inn á stykkini hjá fólki bæði oman fyri og niðanfyri vegin og liggur nú so høgt í støðum, at fólk, sum megnpartin av síni tíð hava havt adressu á Marknagilsvegnum, ikki sleppa til henda veg longur, hóast hann liggur inni á teimum.

Tí eru nýggir til- ella frákoyringarvegir gjørdir í aðrar ættir. Tað er harmiligt, at hendan vegagerðin bleiv so óstortlig fyri mong, sum har búgva. Vónandi verður kortini búgvandi har í framtíðini eisini.

**Framhald út á Argir**

Í mong ár var tað vandamikið at koyra eftir Marknagilsvegnum, serliga á vetrardegi, og tú valdi bara hendan vegin av neyð. Tað legði størri trýst á ferðsluna longur niðri í býnum.

Vegurin varð latin upp aftur í árinum, og tað skerst ikki burtur, at tann endurnýggjaða farleiðin, sum knýtir vesturbýin saman við eystara part av býnum, hevur stóran týdning fyri ferðsluna í Havn.

Ætlanin er, at hesin ringvegur skal halda fram út á Argir. Vegføringin verður beint norðanfyri kirkjugarðin og yvir um Sandá. Teir stóru pengarnir eru ikki settir av til framhaldið í hesum endanum enn, men fyrireikingar verða gjørdar. Linjan er løgd og avgjørt er, hvar tann nýggja brúgvin skal verða.

*Framhald á s. 14*